SKYGD v/ Jonnu Nygaard
Nólsoyar Pállsgøta 9
700 KLAKSVÍK
FØROYAR

Argir hin 24. januar 2012
Málsnr.: 10/00058-6
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

# Umhvørvisgóðkenning
# av
# Reinsarínum Skygd í Ánunum

Henda umhvørvisgóðkenning av reinsarínum Skygd, matr. nr.41g í Ánunum í Klaksvíkar kommunu, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. mai 2008, og § 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna. Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

## 1. Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi, ampum og heilsuskaðum, sum kunnu standast av virkseminum.

## 2. Umsóknin

Reinsaríið Skygd fekk tann 1. mai 2009 umhvørvisgóðkenning (mál nr.: US-41204-001/09/10). Tá var virkið staðsett á matr.nr. 674 í Klaksvík. Tann 31. oktober 2011 boðaði virkið frá, at virksemið verður flutt til matr. nr. 41g í Ánunum (mál nr.:10/00058-1). Eisini varð boðað frá, at einki er broytt við virkseminum og at innrættingin er tann sama sum áður. Tískil verður sama umsókn (mál nr.: US-41204-001/09-12) nýtt, sum tá Skygd søkti um góðkenning á matr.nr. 674 í Klaksvík.

## 3. Lýsing av virkseminum

Reinsaríið Skygd er staðsett á matr. nr. 41g í Ánunum í Klaksvíkar kommunu í privatum sethúsum, har vaskaríið Teistatangi eisini heldur til. Í kjallaranum er ein íbúð har fólk búgva. Virksemið á Skygd er kemisk reinsan av klæðum. Klæðini verða reinsað við kolvetni í einari maskinu, sum er partur av eini avbyrgdari skipan. Maskinan endurnýtir kemisku evnini og hevur automatiskt turkikontrol, sum ger, at maskinan ikki steðgar turkingini, fyrr enn máting vísir, at minst møguligt av kemikalium eru eftir í klæðunum. Tá klæðini koma úr maskinuni, verða tey pressað, rullað og strokin, og eru so klár til kundan.

# 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

## 4.4 Luftútlát

Reinsaríið nýtir kolvetni (kulbrinte) til at reinsa klæðini við. Kolvetni er eitt lívrunnið loysingarevni, ið kann vera heilsuskaðiligt. Í kjallaranum í húsunum har skygd er, er ein íbúð har fólk búgva. Tískil verður treyt sett í góðkenningini fyri hvussu nógv Innihaldið av kolvetni má verða í grannarúmum, sum verða nýtt til búðstað.
Reinsaríið hevur ventilatión, sum koyrir alt samdøgrið. Útlátið verður leitt út gjøgnum skorstein.

## 4.5 Spillivatn

Frá virkseminum væntast einar 300 l av kølivatni frá hvørjari reinsing, sum verður leitt í kommunala spillivatnsleiðing. Kølivatnið kemur ikki í sambandi við kemisk evni, og er tí ikki dálkað.

## 4.6 Óljóð

Mett verður ikki at tað verður nakað serligt óljóð frá virkseminum. Tó skal virkið yvirhalda tey markvirði, sum altíð verða sett fyri óljóð frá virkjum.

## 4.7 Burturkast

Nakað av burturkasti verður frá virkseminum, og av kemiskum burturturkasti væntast árliga eini 100 l av destillatiónsrest, sum verður uppsamlað og burturbeint sum vandamikið burturkast. Alt burturkast skal skiljast og goymast í hóskandi íløtum, og merkjast týðiliga áðrenn tað verður latið IRF.

# 5 Viðgerð

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent Skygd og Klaksvíkar kommunu tann 14.12.2011 til viðmerkingar.
Klaksvíkar kommuna boðaði frá, at spillivatnsviðurskiftini ikki vóru í lagi, men var hetta ein partur av spillivatnsætlanini hjá kommununi og fór hetta tí at koma uppá pláss í nærmastu framtíð.
Skygd hevði eina viðmerking til nøgdina av kemiskum burturkasti (punkt 4.7), sum varð tikin til eftirtektar. Skygd hevði eisini eina viðmerking til treyt 6.3.2. um útleiðing til luft. Skygd ynskti undantak til at skorsteinurin skal verða minst ein metur yvir takrygg. Henda treyt verður ikki broytt orsakað av møguligum heilsuvanda frá kolvetni.

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á

- At umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið
- Dálkingaravmarkandi tiltøk um óhapp henda
- At fyribyrgja heilsuskaðum av lívrunnum loysingarevnum

# 6 Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við hesum treytum:

## 6.1 Almennar treytir

6.1.1 Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2 Møguligar sýnistøkur, kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.3 Møguligar sýnistøkur, kanningar, metingar av úrslitum og metingar annars verða goldnar av Skygd.

6.1.4 Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um útlát ella vanda fyri útláti, fyrr enn góðkenning er fingin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.5 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.1.6 Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum hjá Skygd. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.7 Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er at:

- ampar verða av virkseminum, sum ikki kundu síggjast tá góðkennignin varð givin,
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingar-/skaðaárin,
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin, ella
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.8 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2 Innrætting og virksemi

6.2.1 Virkið skal innrættast og rekast, sum ávíst í móttiknum tilfari (US-41204-001/09-12).

6.2.2 Miðast skal eftir at nýta evni og tilfar, ið hava minst møguligt árin á umhvørvið.

6.2.3 Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.2.4 Reinsiskipanin skal vera undir regluligum eftirliti og viðlíkahaldi sambært ávísing frá leverandøri. Kannast skal, at allar trygdarfunktiónir virka sum tær eiga, harundir at skipanin er tøtt.

## 6.3 Útleiðing til luft

6.3.1 Virksemið má ikki hava við sær heilsuvanda ella ampa av royki, lukti ella dusti uttan fyri øki virkinsins.

6.3.2 Ventilatión frá arbeiðsrúmum og goymslum skal førast upp eftir og minst ein metur yvir takrygg.

6.3.3 Fyri at avmarka luftdálking, skulu loft, veggir, gólv, rørføringar, hurðar og vindeygu í arbeiðsrúmum – tó ikki hurðar og vindeygu sum føra út fría luft – vera tøtt og skulu viðlíkahaldast soleiðis at tey altíð eru tøtt. Hurðar til og frá arbeiðsrúmum – tó ikki hurðar sum føra frá arbeiðsrúmum og út í fría luft – skulu kunna fara aftur av sær sjálvum.

6.3.4 Ventilatiónsskipanin og avkastið skulu vera undir regluligum eftirliti og viðlíkahaldi, soleiðis at tryggjað verður, at tað er tætt og tað virkar eftir ætlan.

6.3.5 Um heilsuvandi ella ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

6.3.6 Innihaldið av kolvetni í grannarúmum, sum verða nýtt til búðstað, má ikki vera hægri enn 0,6 mg/m$^3$.

6.3.7 Metir Umhvørvisstovan tað neyðugt, kann Umhvørvisstovan krevja, at Skygd ger mátingar sum dokumentera, at innihaldið av kolvetni ikki er hægri enn 0,6 mg/m$^3$. Kanningarhættir og sýnistøkur skulu góðkennast av Umhvørvisstovuni.

## 6.4 Goymslur

6.4.1 Evni og tilfar, ið kunnu dálka, skulu goymast soleiðis, at einki útlát til umhvørvið kann fara fram. Reinsiskipanin, kemikalii og vandamikið burturkast skal standa á spillbakka ella líknandi soleiðis at møguligir lekar verða hildnir aftur. Bakkin skal kunna rúma nøgdina í størsta ílatinum.

6.4.2 Kemikalii skulu goymast í upprunaligu íløtunum við tøttum loki, ella í íløtum, sum eru egnað til goymslu av viðkomandi kemikalii.

6.4.3 Evni, ið eru á goymslu uttandura, skulu vera í íløtum, sum eru góðkend til uttandura goymslu av viðkomandi evni.

## 6.5 Burturkast

6.5.1 Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[1], og skal latast til góðkendan móttakara.

6.5.2 Burturkast skal goymast í íløtum ella bingjum, sum eru egnað til endamálið, og skal standa soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa.

6.5.3 Burturkast skal regluliga latast góðkendum móttakara, soleiðis at goymslurnar ikki gerast ov stórar.

6.5.4 Burturkast, sum inniheldur reinsivesku ella annað kemikalii, skal goymast í egnaðum íløtum við tøttum loki.

6.5.5 Tóm kemikaliiíløt mugu ikki nýtast til onnur endamál, men skulu burturbeinast sambært ásetingunum hjá móttakara.

## 6.6 Spillivatn

6.6.1 Kølivatn sum verður leitt út í kloakkina, má ikki vera so heitt at tað skaðar rørleiðingar.

## 6.7 Óljóð

Óljóð[2] frá virkseminum má ikki fara upp um virðini í talvu 1.

**Talva 1: Markvirði fyri óljóð - dB(A)**

| | mán – frí kl. 07 – 18<br>leyg. Kl. 07 - 14 | mán – frí kl. 18 – 22<br>leyg. kl. 14 – 22<br>sunnu- og halgidagar kl. 07 - 22 | Allar dagar<br>kl. 22 - 07 |
|---|---|---|---|
| **Økið 1: Vinnuøkið, har larmandi virksemi kann fara fram** | 70 dB | 70 dB | 70 dB |
| **Økið 2: Vinnuøkið, har minni larmandi virksemi kann fara fram** | 60 dB | 60 dB | 60 dB |
| **Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarøki** | 55 dB | 45 dB | 40 dB |
| **Øki 4: Bústaðarøki** | 45 dB | 40 dB | 35 dB |

Markvirðini, sum eru sett í talvu 1, vísa, at um ein er staddur í t.d. økið 4, sum er bústaðarøki, millum kl. 22 - 07, er mest loyvda óljóð 35 dB frá virkseminum hjá Skygd

[1] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007

[2] Ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A) í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.